## Danir eta meira fisk

Í eina tíð hevur lutfalsliga nógv verið gjørt burtur úr donskum átøkum, sum hava til endamáls at fáa fólk at eta meira fisk. Donsku átøkini hava gjørt góðan mun, og í dag eta donsku húsarhaldini í miðal fisk fjórða hvønn dag. Donsku átøkini halda fram, og málið er nú, at fólk skulu fáast at eta fisk triðja hvønn dag. Danska blaðið Fiskeri Tidende skrivar, at skal hetta mál røkkast, er neyðugt, at handlarnir, sum selja fisk, fáa betri fiskadiskar. Kanska kundu átøkini hjá dønum verið verd at hugt uppá í Føroyum, nú fiskur er so lætt atkomiligur her hjá okkum. Fiskavirkið Norðfra í Norðdepli selir eitt fittan part av síni framleiðslu á heimamarknaðinum.



## Laksáfoss nøgdur við prís

Fyrr í ár var ivi sáddur, um nóg mikið fæst fyri Føroya Banka við tí søluhátti, sum er valdur. Nú er virði bankans gjørt upp til at liggja millum 1,6 og 1,9 milliard krónur, og Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, heldur hetta vera eina nøktandi upphædd fyri bankan. – Hatta er ein góður prísur, vit fáa fyri bankan, tað er tað, sigur Magni Laksáfoss við Útvarpið. Meðan Føroya Banki er virðismettur til knappar tvær milliardir, er Eik Banki er mettur til nærum fýra milliardir. Men Magni Laksáfoss ávarar staðiliga ímóti at samanbera føroysku bankarnar beinleiðis, tí útgangsstøðið er so ymiskt, sigur hann.

# at friða innastu leiðirnar



*Útróðrarbátarnir eru vorðnir betri, og tað er reiðskapurin eisini. Fiskað verður við ymiskum agni, og nógvir fiska við feskari gággu. Haraftrat kemur, at nógvir bátar hava egningartrakt og soleiðis altíð kunnu royna við nýggjum agni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

royna í klettin. At friða tær innastu leiðirnar, ið eru uppvakstrarøkið hjá ungfiskinum, hevði verið eitt ítøkiligt stig, ið eg onga løtu ivist í hevði tænt sakini. Toskurin, sum veksur upp á hesum leiðum, er tann fiskur, sum seinni skal seta til fiskiskapin, sigur Jákup.

Spurdur, um hann væntar, at landsstýrið og løgting fara at taka so stór stig í einum valári, sigur hann, at hetta er tað mest ítøkiliga, sum myndugleikarnir kunnu gera.

- Eg vænti ikki, at politiski myndugleikin vil leggja tann parting av flotanum, sum veiðir mesta toskin. Tað er óhugsandi, og tí noyðast tey, sum skulu taka avgerðirnar, nú nýtt fiskiár byrjar til heystar, at leggja høvdini í blot og finna út av, hvørji ráð annars eru til at taka, um tey vilja niðurundir komna toskastovninum væl.

Hann vísir á, at við fiskidagaskipanini ber ikki til at áseta eitt sonevnt TAC fyri ein fiskastovn, tí veiðan hjá summum skipabólkum er blandað.

- Fiskidagaskipanin leggur nevniliga upp til, at vit skulu hava ein sunnan "blandingsfiskiskap", men skulu vit fáa mest møguligt burtur úr hesum, skulu fiskastovnarnir helst ikki koma so langt niður, sum toskastovnurin er í løtuni.

Jákup sigur, at eitt av málunum við fiskidagaskipanini var, at hon skuldi vera "sjálvregulerandi", soleiðis at nógv kemur burtur úr, tá stovnarnir eru væl fyri – og minni, tá ið teir eru verri fyri.

- Men hetta hevur ikki víst seg ikki at halda, tá til ber við skipanini undir givnu umstøðunum at fiska ein stovn so langt niður, at stovnurin er niðanfyri sonevndu fyrivarnisregluna.

Hann vísir á, at traditiónin er, at teir, sum kunnu fiska tosk, liggja longri á honum, tí teir halda, at hóast tú ikki fært so nógv, so loysir tað seg kortini betri enn at fiska nakað annað.

- Hetta ger, at trýstið gerst ov stórt, og tá er vandi fyri, at stovnurin fær ilt við at koma fyri seg aftur og soleiðis framhaldandi kann vera ein týðandi partur av grundarlagnum.

Jákup Reinert sigur, at útróðrarflotin, sum hevur loyvi at royna í klettin, er vorðin alsamt effektivari, sum árini eru gingin.

- Bátarnir eru vorðnir betri, og tað er reiðskapurin eisini. Fiskað verður við ymiskum agni, sum verður keypt úr útlandinum, og nógvir fiska við feskari gággu. Haraftrat kemur, at nógvir bátar hava egningartrakt og soleiðis altíð kunnu royna við nýggjum agni.

Fiskifrøðingurin leggur dent á, at havumhvørvið neyvan er øll orsøkin til, at toskastovnurin er so illa fyri.

- Gróðurin á landgrunninum, sum skapar lívsgrundarlagið undir fiskastovnunum, hevur seinastu árini ikki verið yvir miðal, men hann hevur heldur ikki verið vánaligur – og als ikki so vánaligur, sum hann var seinast í áttatiárunum og fyrst í nítiárunum.

Hann sigur, at sjálvandi hevði tað tænt fiskastovnunum, um vit høvdu havt yvir miðal góðan gróður hesi seinastu árini.

- Tað hevur so ótruliga stóran týdning fyri vøksturin, hvussu lívsgrundarlagið hjá fiskinum er. Eitt er sjálv gýtingin. Annað er, hvat kemur undan og seinni kemur í fiskiskapin

Jákup sigur, at gýtingarstovnurin hjá toski í løtuni er niðanfyri tað, sum hildið verður at vera ráðiligt, og tí er tað ein spurningur, um stovnurin megnar at framleiða ta tilgongd, sum skal til fyri, at vit næstu árini fáa góða veiði.

- Tilgongdin hevur verið vánalig í nøkur ár, men umráðandi er, at tað, sum kemur undan, sleppur at veksa seg inn í veiðina, sigur fiskifrøðingurin.